## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og seinnapartin regn ella mjørki. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið Pálmasunnudag:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í strúk av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur. Týsdagin lot av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Kundadagar í Drós

**Parfumarí Drós, sum fyri stuttum fekk nýggj høli í Dr. Jakobsensgøtu, bjóðar í hesum døgum kundum sínum at koma inn at fáa ókeypis make-up lagt á. Hetta er ein liður í endauppgávuni, sum lærlingurin, Katrin, skal gera**

*Ingrid Bjarnastein*

Katrin lærir til krambakall við spesiali í húð- og kropsrøkt og make-up. Sum ein partur av endaligu uppgávu síni skal hon skipa fyri onkrum aktiviteti í handlinum, og hevur hon valt at geva kundunum møguleika at koma inn at fáa ókeypis make-up lagt á, av merkinum Bonjois. Bonjois er eitt merki, sum stílar ímóti tí yngra ættarliðnum, eini 14 til 26 ár.

– Eg eri tann, sum skal royna at fáa Bonjois fram her í Føroyum, greiðir Katrin frá. – Og sum ein partur av endaligu uppgávuni har eg skal gera ein aktivitet í handlinum, havi eg valt at leggja ókeypis make-up á í eina viku. Hetta er so møguligt fram til leygardagin. Bonjois er eitt franskt merki, og vit eru tey einastu í Føroyum, sum brúka tað. Tað er ætlað teimum yngru, men eldri kunnu saktans eisini brúka tað, um tey hava hug.

Inn í Drós koma tvær skúlagentur. Tær eru Jóhanna og Fríða úr Hoyvík, og tær skulu konfirmerast sunnudagin. Katrin leggur teimum make-up á, meðan hon greiðir frá, hví hon ger soleiðis, og hvat tað er gott fyri. Aftaná fáa tær ein seðil, har tær síggja, hvat fyri make-up Katrin hevur brúkt, soleiðis, at um tær hava hug at keypa vøruna seinni, so er onki at taka feil av.




*Her leggur Katrin make-up á hjá teimum báðum Jóhonnu og Fríðu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Kundakvøld

– Vit eru eisini farin at skipa fyri kundakvøldum, sigur Fía Norðberg, sum eigur og rekur Drós.

– Her er talan um ein lítlan bólk av kvinnum, eini seks til átta, sum koma inn til okkara okkurt kvøldið, har tær so fáa lagt lag á. Tær sleppa at gera alt sjálvar. Reinsa húðina, smyrja sær og so framvegis, meðan vit samstundis geva teimum ráð, og fortelja teimum, hvussu tær skulu gera. Ofta er tað soleiðis, at tá tær bara koma her, og fáa alt gjørt, so duga tær ikki tá tær koma til hús. Ístaðin lata vit tær gera tað sjálvar, so tær læra tað.

Kundakvøldini eru ætlað smærri bólkum. Einum bindiklubba ella bara nøkrum vinkonum, ið vilja hugna sær okkurt kvøldið. Bólkurin skal tó vera minni enn 10 persónar, tí annars verða ov nógvar, og starvsfólkið fær ikki tíð at koma runt til øll. Fyri at frætta nærri um kundakvøldini ber til at ringja til Parfumarí Drós á telefon 314811.

Til og við leygardagin ber so til at fara inn og fáa ókeypis make-up lagt á, og samstundis fáa nøkur góð ráð um tína húð.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷18 |
| Nuuk | ÷14 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 13 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 15 |
| Róm | – |
| Malorca | 21 |
| Athen | 19 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 26 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1022 hPa. eystan fyri Ísland mennist. Eitt djúpt lágtrýst, 964 hPa. vestan fyri Azorurnar fer í landnyrðing.




Hátrýstið eystan fyri Ísland stendur mestsum í stað, meðan lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/03 kl. 06[00]– 21/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 1,2°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 20/03 kl. 06[00]– 21/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 29,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

14. mars: Mánin longst frá jørðini
22. mars: Fyrra kvarter
28. mars: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. mar | 00.05 | 12.44 | 11.44 | — | 11.59 | — | 02.05 | 14.44 | 03.05 | 15.44 |
| 23. mar | 01.23 | 14.03 | 00.23 | 13.03 | 00.38 | 13.18 | 03.23 | 16.03 | 04.23 | 17.03 |
| 24. mar | 02.43 | 15.09 | 01.43 | 14.09 | 01.58 | 14.24 | 04.43 | 17.09 | 05.43 | 18.09 |
| 25. mar | 03.36 | 16.03 | 02.36 | 15.03 | 02.51 | 15.18 | 05.36 | 18.03 | 06.36 | 19.03 |

| Dagur | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. mar | 10.59 | 23.38 | 09.59 | 22.38 | 00.20 | 12.59 | 01.20 | 13.59 | — | 12.29 | 01.05 | 13.44 |
| 23. mar | — | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 01.38 | 14.18 | 02.38 | 15.18 | 01.08 | 13.48 | 02.23 | 15.03 |
| 24. mar | 00.58 | 13.24 | — | 12.24 | 02.58 | 15.24 | 03.58 | 16.24 | 02.28 | 14.54 | 03.43 | 16.09 |
| 25. mar | 01.51 | 14.18 | 00.51 | 13.18 | 03.51 | 16.18 | 04.51 | 17.18 | 03.21 | 15.48 | 04.36 | 17.03 |

5 707265 100050 >